# DROPAR & DILEMMA

EFTIR: **ÓLUVU ZACHARIASEN**. MYNDIR: **AMY HANSEN / AMY&EDNA, TRÓNDUR DALSGAARD**



Løtan, tá 15 ára gamla dóttirin spyr teg, um tú kanst keypa henni tvey blikk av cider, tí hon skal í veitslu í kvøld.

**What to do?!**

Sigi eg nei, drekkur hon kanska okkurt ivasamt bland, sum hon fær stungið í hondina í veitsluni. Sigi eg ja, so sigi eg samstundis, at tað er í lagi at drekka á so ungum aldri.

Kanningar vísa, at flestu 15 ára gomul í Føroyum hava roynt rúsdrekka. - Ung drekka, tí samfelag og foreldur vænta av teimum, at tey fara at drekka, heldur leiðarin í Margarinfabrikkini, sum mælir til at hyggja at øðrum samfeløgum, har ung duga at hugna sær uttan rúsdrekka.

- Vit mugu vera realistisk og skilja, at tey ungu liva í einum sosialum samanhangi, sigur mamman, sum gevur sínum tannáringum rúsdrekka. - Foreldur skulu duga at siga kortanei, heldur pápin úr Leirvík. - Vit skulu í størri mun vísa teimum ungu á tey, sum ikki drekka, sigur SSP-ráðgevin, sum mælir frá at geva ungum tannáringum rúsdrekka.



# Fýra av fimm 15 ára gomlum hava roynt rúsdrekka

Flestu næmingar í 9.flokki í Føroyum hava roynt rúsdrekka, men teir drekka tó minni enn næmingar í Evropa

**Fyri hvørt ár, sum fyrsti smakkurin av alkoholi verður útsettur, minkar vandin fyri at gerast bundin av rúsevnum við 14 prosentum. Tað vísir amerikonsk gransking.**

*Kelda: www.rusan.fo*

Um fitti 15 ára gamli tannáringurin hjá tær sigur, at hann ongantíð hevur smakkað rúsdrekka, so er tað rættiliga sannlíkt, at hann pellar. Ein nýggj kanning vísir nevniliga, at 81% av næmingunum í 9.flokki í Føroyum hava roynt rúsdrekka. Eitt vet hægri enn evropiska mIðaltalið, sum er 80%.

## Byrja seinni

Sama kanning vísir, at føroyskir næmingar drekka minni enn evropisku javnaldrarnir. Meðan 47% av evropearum hava roynt rúsdrekka, sum 13 ára gomul ella yngri, hava "bara" 31% av føroysku næmingunum roynt rúsdrekka so ung.
48% av teimum 15 ára gomlu í Evropa hava drukkið seinasta mánaðin, men í Føroyum er talið lægri, nevniliga 38%. Hetta merkir, at 62% IKKI hava drukkið seinasta mánaðin. Talið tykist vera minkandi, tí í 2011 vóru tað knapt 56%, sum ikki høvdu smakkað rúsdrekka seinasta mánaðin.
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu hevur síðan 1989 kannað m.a. rúsdrekkanýtsluna hjá næmingunum í 9.flokki. Hetta er ein liður í evropisku kanningini, ESPAD (European School Survey Projekt on Alcohol and other Drugs), har 35 lond luttaka. Nýggjasta kanningin varð gjørd á vári 2015. Í Føroyum luttóku 88,3% av næmingunum, sum vórðu føddir í 1999, í kanningini.

## Kanning hjá Kvinnu

Tølini samsvara rættiliga væl við eina kanning, sum Kvinna í september gjørdi millum 1. árs næmingar á studentaskúlunum í Suðri, Kambsdali og í Hoydølum. Tilsamans 149 næmingar – flestu teirra millum 15 og 17 ár - svaraðu kanningini.
Av tí at talan bara er um ein part av næmingunum, sum hava svarað, skulu úrslitini sjálvandi takast við fyrivarni, men tey geva eina lítla ábending um drykkimynstrið hjá føroyskum ungum.
Í fesku kanningini hjá Kvinnu svara útvið 73%, at tey drekka rúsdrekka, meðan 27% siga, at tey drekka ikki. Gott 72 % hava verið full.

## Bara 1% bíðar

Umleið 73-74% av teimum ungu byrja at drekka, áðrenn tey eru 16 ár. Bara 1% bíða, til tey eru vorðin 18 ár.
Tað vanliga er at fáa vinfólk at keypa rúsdrekka. Tey spurdu kundu krossa ymiskar hættir av, t.e. ikki bara ein hátt. Knapt 48 % siga, at vinirnir keypa. Men ofta keypa tey ungu sjálvi. Hetta svara í øllum førum 41 prosent. 36% siga, at foreldrini keypa.

## FAKTA

Tí er rúsdrekka meira skaðiligt fyri ung:

- Heilin er ikki fult mentur fyrr enn út móti 20 ára aldri.
- Minkar innlæringarevnini og minnið hjá ungum.
- Økir um vandan fyri at koma út í óynsktar støður, m.a. vanlukkur, eitran, ósemjur og at hava óynskt kynsligt samband.
- Er vanaelvandi, serliga hjá ungdómi
- Er lívrunnið loysingarevni. Drekka fólk 5 alkoeindir ella meira í senn, hevur hetta serliga skaðiliga ávirkan á heila og kropp.
- Økir um vandan fyri umleið 60 sjúkum, m.a. krabbameini í brósti, munni og tarmi.

*Kelda: www.sundhedsstyrelsen.dk*

# Ofta full sum 13-14 ára gomul




Vanligasti mátin at fáa fatur á rúsrekka var at fáa vinfólk og eldri systkin at keypa, siga trý ung, sum byrjaðu at drekka sum heilt ungir tannáringar.

– Eg plagdi at stjala frá mammu og babba. Tók eitt sindur av ymsum fløskum, t.d. whisky, snaps og vodka, og fylti upp aftur við vatni, greiðir Marita frá og snerkir flennandi við minnið um, hvussu illa tað onkuntíð smakkaði.
Vit hava spurt trý ungfólk um tíðina, tá tey byrjaðu at smakka sær á. Av tí at evnið rúsdrekka er rættiliga eymt, vilja tey vera dulnevnd. Vit hava tí broytt nøvnini og kalla tey Rannvá, Marita og Høgni.
Rannvá er í dag 18 ára gomul og Marita 19 ár. Fyrstu ferð, tær drukku rúsdrekka, vóru tær bara 14 ára gamlar. Síðan tá hava tær drukkið regluliga til veitslur um vikuskiftini. Ofta hvørt vikuskifti.

## Fullur sum 13 ára gamal

Høgni er í dag 18 ár. Hann byrjaði longu sum 13 ára gamal at drekka og var fullur longu fyrstu ferð, hann royndi rúsdrekka.
– Fyrstu tíðina drakk eg kanska eina ferð um mánaðin, men eftir at eg var 15 ár, var tað hvørt vikuskifti, greiðir Høgni frá.
Foreldrini varnaðust, at hann onkuntíð kom fullur heim. Tey deildu eitt sindur og ávaraðu um, at hann kundi gerast alkoholikari. Frá tí at Høgni var 16 ár keyptu foreldrini rúsdrekka til hansara, bæði øl og onkuntíð eina lítla fløsku av brennivíni.
Vanligasti hátturin at fáa rúsdrekka, er frá eldri vinfólki og systkjum. Serliga er lætt hjá dreingjum at fáa fatur á rúsdrekka, halda Marita og Rannvá. Stóribeiggjar tykjast hava lættari at keypa til ein yngri beiggja enn eina lítlasystir.
Ofta ballaðust tey hjá vinum, har foreldrini vóru burturstødd. Øll hjálptu at fjala sporini eftir veitsluna, m.a. turka spýggj upp hjá óhepnum vinfólki. Tey avdúka flennandi, at ballarí fyrstu tannárini snýr seg um at fjala spor. Stramma seg upp við døgurðaborðið sunnudag. Busta tenninar væl og eta tyggigummi, so foreldrini onki lukta. Megnar man kortini ikki at fjala elendigheitina, kann man altíð geva matinum í gjárkvøldið skyldina.

## Mamman fekk ein hvøkk

Meðan foreldrini hjá Høgna vistu, at hann drakk, var tað loyniligt hjá Maritu og Rannvá. Marita trúði at foreldrini vistu at hon drakk, tá hon var umleið 16-17 ár. Ein sunnumorgun, gott 17 ára gomul, segði hon við mammuna, at hon var so ring í timburmonnum. Mamman bleiv sera skøkk og visti als ikki av, at Marita smakkaði sær á.
– Míni foreldur vistu onki í fyrstuni, men eg haldi at tey við árunum fingu illgruna. Men vit tosaðu ongantíð um tað, sigur Rannvá.
Tey, sum svíkja seg, drekka eins nógv og hini, sum sleppa at drekka, siga tey trý. Foreldur, sum keypa øl ella cider til børnini, skulu hinvegin heldur ikki vænta, at børnini bara halda seg til tað. Einasti máti at forða børnunum í at drekka ivasom bland, er at geva teimum nóg mikið við. Tvær cider eru ov lítið, ljóðar dómurin.

## Uttanfyri

Høgni, Rannvá og Marita siga, at ongin teirra merkti nakað trýst frá øðrum at drekka. Tey vóru forvitin eftir at royna tað, tí teirra vinfólk drukku.
Men tey ásanna, at tey sum ikki drekka, eru eitt sindur uttanfyri, og verða altíð kravd eftir frágreiðing, hví tey ikki drekka.
– Eg haldi faktisk ikki, at eg kenni nakran, sum ikki drekkur, sigur Rannvá bæði kløkk og hugsunarsom í senn.
Í dag eru tey myndug og kunnu keypa sjálvi. Øll siga tey, at tey drekka væl minni nú enn í villu tannárunum.

# Úrslit úr **spurnakanning** hjá Kvinnu

**Eg drekki ikki, tí:**
- eg fái ein bil, um eg ikki drekki, til eg verði 18 ár
- eg ikki havi hug til tað, ella tí eg skal gera onkran ítrótt e.t. dagin/skjótt aftaná

**Eg drekki, tí:**
- tað er hugnaligt, og eg fái eina góða kenslu
- eg tá havi tað lættari sosialt
- eg vil, ella um tað hevur verið ein hørð vika. Men eg dugi væl at fara í býin edrú eisini
- tað er hugnaligt, og tað er lættari at sleppa gerandisdagstonkum.

## Hevur tú nakrantíð verið so full/ur, at tú:




- Eg angri tað (tá eg havi drukkið - red.) og fái moralskar, men eg veit, at eg hevði tað stuttligt ímeðan og fari at halda, at tað er stuttligt um nakrar dagar, og so havi eg eisini eina góða søgu at fortelja ommubørnunum, um eg fái nøkur ;)

## Hvussu fært tú fatur á alkoholi? Til ber at velja fleiri svar






# Vit vænta, at tey drekka

- Kanska drekka tey ungu, tí foreldur og samfelagið vænta av teimum, at tey fara at drekka, sigur Salua Manai, leiðari í Margarinfabrikkini

Í svørtu toysofuni í sjónvarpsstovuni á Margarinfabrikkini í Havn sita tannáringarnir og práta um kvøldarnar. Eitt evni, sum ofta er uppi at venda, er rúsdrekka.
Tað er ikki loyvt at drekka í Margarinfabrikkini, men tey ungu práta kortini um tað.
- Ungfólk í dag eru rættiliga opin um rúsdrekka, heldur Salua Manai, leiðari í Margarinfabrikkini.
Tey fortelja ofta, hvat tey gjørdu um vikuskiftið, um tey drukku, vóru full o.s.fr.
- Vit eru hvørki lærarar ella foreldur. Tí føla tey helst, at tey kunnu tosa meira við okkum.
Starvsfólkini royna ikki at moralisera, men heldur at fáa tey ungu at hugsa um, hvat tey gera. Seta spurningar, hví tey gjørdu okkurt ávíst ella hava trongd at fortelja tað.

## Gentur drekka eins nógv

Salua Manai sigur, at millum næmingar í 8. flokki er lítið av rúsdrekka - bara onkur, sum hevur smakkað tað. Í 9. flokki byrja tey at vera upptikin av rúsdrekka og royna tað fyri fyrstu ferð. Summi halda, at gentur drekka minni, men tað er ikki tann fatanin, Salua Manai hevur. Genturnar drekka eins nógv og dreingirnir. Har er eingin munur. Tað eru serliga næmingar úr miðbýarskúlunum, sum eru tíðliga á veg við rúsdrekka. Næmingar úr Hoyvík og Argjum eru meira afturhaldnir og tykjast byrja seinni.

## Tí hini drekka

Tey ungu drekka, tí hini drekka, heldur Salua Manai.
- Uttan at eg veit tað, haldi eg, at ein stórur partur av ungdóminum byrjar at drekka, tí at tað "gera øll bara", tá tey koma í ein ávísan aldur. Eg haldi, at samfelagið/mentanin er ein stórur partur, sum stýrir okkara væntanum til eitt nú ung og rúsdrekka.
Salua Manai sigur, at í pedagogheiminum arbeiða tey ofta við hugtakinum, at børn gera tað, sum verður væntað av teimum.
- Tað er ikki vist, at vit kunnu flyta tað beinleiðis yvir á rúsdrekka, men onkursvegna haldi eg, at tað snýr seg um hetta kortini.
Næstan øll foreldur vænta, at teirra barn fer at drekka fyrr ella seinni. Sum vit bara bíða eftir tí og vóna tað frægasta. Tað er so inngrógvið í okkara mentan, at tá tú nært fermingaraldur, so er frítt slag.

> - Alkohol doyvir okkara evni at meta um støður. Ung eru í størri vanda fyri at gera okkurt, tey kunnu angra ella stríðast við restina av lívinum.

## Vandamikið bland

Eftir hennara tykki hoyra ung og rúsdrekka ikki saman. Tey eru ikki búgvin, hvørki sálarliga ella kropsliga.
- Alkohol doyvir okkara evni at meta um støður. Ung eru í størri vanda fyri at gera okkurt, tey kunnu angra ella stríðast við restina av lívinum. Hesin vandin og ábyrgdin eru bara ov stór at geva teimum.
- Haraftrat er heilin ikki fult mentur.
Alkoholið ávirkar innlæringarevnini og minnið hjá ungum meira enn hjá okkum vaksnu. Tað er vanaelvandi, og ungfólk eru í størri vanda fyri at verða bundin av onkrum enn vaksin.

## Hyggja at øðrum

Salua Manai heldur, at tað kundi verið áhugavert at vent eygunum móti londum, har rúsdrekka ikki er so stórur partur av mentanini sum í Føroyum.
- Vit kundu spurt, hvat tað er, sum ger, at teirra ungu kunnu fara í býin at dansa og hava tað stuttligt uttan at vera ávirkað av alkoholi. Kanska vit skulu byrja at vænta nakað annað av okkara ungu, enn vit gera nú, sigur Salua Manai.

# Foreldur skulu tora at siga kortanei

Tað er bláoygt at halda, at børnini bara drekka tað, tú gevur teimum við í ball, sigur Petur Reinert. Hann noktar at keypa børnum sínum rúsdrekka, fyrr enn tey eru 18 ár.



Tá børnini hjá Peturi Reinert í Leirvík fara í ball, kunnu tey akkurát tað sama spara sær at spyrja um eina øl ella tvær cider. Svarið er kortanei.
38 ára gamli Petur og kona hansara, Noomi, hava tað prinsipp, at tey keypa ikki rúsdrekka til børnini.
– Tú ert myndug, tá tú fyllir 18 ár, og áðrenn tað er ikki loyvt at keypa rúsdrekka. Tað er sera einfalt, heldur Petur Reinert, sum er lærari og fótbóltsdómari. Hann er pápi at trimum børnum í aldrinum 19, 13 og 0 ár.

## Pedagogiskt fjas

Bersøgni lærarin úr Leirvík dylur ikki fyri, at hann heldur tað vera pedagogiskt fjas, at foreldur skulu lova børnum sínum alt. Foreldur skulu traðka í karakter og tora at siga nei uttan nakra sum helst grundgeving.
– Foreldur royna í alt ov stóran mun at vera vinir við børnini heldur enn at vera foreldur.
Hann er fullgreiður um, at børnini – eisini hansara – sníkja seg at drekka. Men heldur ikki tað fær hann at broyta meining og keypa teimum rúsdrekka.
Sjálvur sníkti hann seg at drekka, áðrenn hann var 18 ár. Mamman visti tað, men segði ongantíð nakað.

## Vil ikki vita tað

Dóttirin, Teresa, er nú 19 ár. Petur veit, at hon smakkaði sær á, áðrenn hon var 18. Einaferð hann avheintaði hana í bili í einari veitslu, sá hann, at hon hevði kenning. Hann læt sum einki. Men við morgunmatarborðið hevði unga daman so ringa samvitsku, at hon fortaldi, at hon hevði drukkið kvøldið fyri.
– Eg vildi als ikki hava hetta at vita. Tí við hesum tvingaði hon meg at taka støðu til tað.
Dóttirin fekk onga revsing, men fekk at vita, at álit tekur langa tíð at byggja upp, men er skjótt at bróta niður.
Í hansara eygum er einki nýtt undir sólini, tá tað snýr seg um hugin hjá ungfólki at smakka sær á. Tað hava tey gjørt tey seinastu 100 árini, og vit fáa neyvan gjørt nakað við tað. Og so er Leirvík eftir hansara tykki eitt rættiliga lítið og trygt stað, um tey ungu skulu eksperimentera við rúsdrekka.
Sjálvur heldur Petur, at tey hava eitt avslappað forhold til rúsdrekka heima. Tey hava javnan vín á borðinum fríggjakvøld. Konjakk og whisky stendur í skápinum, og øl er í garasjuni. Einki verður fjalt burtur.

## Skulu hava sínar loynidómar

Liberalu foreldrini geva børnunum rúsdrekka, fyri at tey ikki skulu drekka alt møguligt – kanska sterkari – frá øðrum. Men hesa grundgevingina keypir Petur Reinert ikki.
– Fyri tí um eg keypi dóttrini seks øl, trúgvi eg einki uppá, at hon heldur seg til tað. At halda at børnini bara drekka tað, sum tey fáa við sær frá foreldrunum, er forbankað bláoygt.
Tá ungfólk noyðast at krógva seg at drekka, so avmarkar hetta drekkaríið eitt sindur.
Hvar tey ungu fáa rúsdrekka frá, veit hann ikki, men tað er helst frá onkrum, sum er eldri enn tey. Petur spyr ikki. Tey ungu skulu hava sínar loynidómar í frið.

**78% av næmingum í 9.flokki í Evropa halda tað vera lætt at fáa fatur á rúsdrekka. Og 76% av føroysku næmingunum halda tað vera lætt at fáa hendur á rúsdrekka.**

*Kelda: ESPAD-kanningin 2015*





# Onki skal vera tabu heima hjá okkum

- Stóð tað til mín, drukku tær ikki, fyrr enn tær vóru 18 ár. Men vit foreldur mugu eisini vera realistisk, sigur Anna Dalsgaard, sum hevur givið sínum tannáringum rúsdrekka. Tað snýr seg um álit og gott samskifti.

!

**Danska heilsustýrið mælir frá, at børn og ung undir 16 ár drekka alkohol. Og ung millum 16 og 18 ár eiga at drekka minst møguligt og ikki meira enn 5 alkoeindir í senn. Ein alkoeind er ein vanlig øl ella ein snapsur.**

*Kelda: www.sundheds-styrelsen.dk*

51 ára gamla Anna Dalsgaard hevur saman við manninum, Jan, valt ta meira liberalu loysnina, tá tað kemur til ung og rúsdrekka. Døturnar, Rakul 26 ár, Katharina 19 ár og Hjørdis 15 ár, hava nevniliga fingið rúsdrekka, áðrenn tær hava havt aldur at keypa sjálvar.

## Stór tvístøða

Anna Dalsgaard viðgongur, at hetta er ein sera stór tvístøða. Hon er lærari og eisini SSP-lærari, og har vita tey alt um, at alkohol kann hava skaðiliga ávirkan á ungfólk.
- Stóð tað til mín, drukku tær ikki, fyrr enn tær vóru 18 ár. Men vit mugu eisini vera realistisk. Tær eru ungar, liva í einum sosialum samanhangi, og tað mugu vit fyrihalda okkum til.
Sera grundleggjandi í heiminum hjá Annu og Jan er dialogurin – at kunna tosa saman.
- Vit vilja ikki hava nøkur tabu her í húsinum. Tað er týdningarmikið, at vit kunnu tosa um alt. Eisini tey keðiligu tingini. Og rúsdrekka.

## Bara øl-styrki

Tá døturnar – vanliga í sambandi við veitslur í seinnu helvt av 9.flokki – fyrstu ferð hava spurt um at fáa øl við á veitslu, hava foreldrini tosað við tær um vandarnar av rúsdrekka, og so hava tær fingið eitt sindur við. Fyrstu ferð tveir cider, og so er talið kanska komið upp á 4-6 t.d. á ólavsøku. Rúsdrekkað skal í styrki halda seg til veika ølið, tað merkir veðr ella classic. Einki vín, tí tað er ov sterkt.
Sjálvandi vilja tey helst hava genturnar bara at drekka tað, tær hava við heimanífrá. Men tað eydnast ikki altíð. Onkuntíð hava eldru genturnar havt meira promillu í sær enn tað, sum var í dósunum, tær fingu við.
- Vit eru ikki so bláoygd at halda, at tær ikki kundu funnið upp á at smakkað á okkurt frá øðrum. Men vit hava víst teimum stórt álit og vænta og vóna, at tær hava virðing fyri tí.

## Álit og tætt samband

- Við at vísa teimum álit og møta teimum á leiðini í teirra ynski, er størri møguleiki at varðveita góða dialogin og álitið til okkara børn. Tað hevur altíð havt ómetaliga stóran týdning fyri okkum sum foreldur. Tær skulu kunna siga við okkum, tá tað var stuttligt í býnum, og tá tað var minni stuttligt, sigur Anna Dalsgaard.
- At sleppa undan, at ung undir 18 ár fara at drekka, er helst at seta málið ov høgt, heldur Anna. Men átøkini, sum SSP hevur havt fyri 7. flokkunum seinastu árini, og sum enda við rús- og roykfríum dansi, kundu kanska verið gjørd fyri 8. og 9. flokkar eisini. Tí næmingarnir hava júkað um at fáa eitt slíkt tiltak aftur.

**Í Føroyum er ikki loyvt at selja fólki undir 18 ár rúsdrekka.**

Rúsdrekkalógin, t.v.s. løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992, sigur soleiðis:

*§ 17. 1) Tað er forboðið, at selja ella flýggja út rúsdrekka til persónar, sum ikki eru fyltir 18 ár, ella at flýggja út rúsdrekka, um tað er sannlíkt, at rúsdrekkað er tilætlað øðrum, sum ikki lúka treytirnar fyri at fáa rúsdrekka.*

*Stk. 2. 1) Tann, sum selir, flýggjar út, skeinkir ella letur skeinkja rúsdrekka, hevur skyldu til at um neyðugt tryggja sær við framvísan av samleikaprógvi, at móttakarin lýkur aldurstreytina.*

## 7 GÓÐ RÁÐ at útseta byrjanaraldurin til rúsdrekka:

**1. Ger avtalur við onnur foreldur:** Tosa við foreldrini hjá vinfólkunum hjá tínum børnum og avtala, at børnini sleppa ikki at drekka. Eitt felags bann ger tað lættari at standa móti bólkatrýstinum. Tá so tey ungu sleppa at drekka eitt sindur, setið so eitt felags mark fyri nøgdina.

**2. Verður avtalan brotin:** Hóast tannáringurin brýtur reglurnar, hevur tú hóast alt sagt tína hugsan og sent eitt týðiligt signal, sum undir øllum umstøðum er við til at minka drekkaríið. Eru reglurnar órealistiskar, kann tað vera eitt hugskot at eftirmeta tær – gjarna í samstarvi við barnið, vinfólkini hjá honum/henni og teirra foreldur.

**3. Statt fast við tínar áskoðanir:** Tað nyttar einki bara at siga nei. Tannáringar lurta eftir foreldrunum, tí tey meta, at tey siga okkurt skilagott og grundgeva fyri tí. Ver tilvitað/ur um tínar áskoðanir og tína egnu rúsdrekkanýtslu, áðrenn tú tosar við tannáringin. So er lættari at vera støðuføst.

**4. Vís umsorgan:** Tey flestu ungu vilja hava fastar karmar og fata vantandi karmar sum líkasælu og vantandi umsorgan. Fylg við í, hvar barnið er og hvørjum tað er saman við. Kanningar vísa, at tannáringar, sum hava foreldur, ið fylgja við, hvat tey havast at, drekka minni enn ungfólk, sum hava fríar teymar.

**5. Brúka tíð saman:** Hóast barnið er tannáringur, merkir tað ikki, at hugurin at vera saman við foreldrunum hvørvur. Ung hava framvegis brúk fyri foreldrum, kørmum og góðum fyrimyndum – nógv meira enn tey kanska sjálv siga.

**6. Gev barninum sjálvsálit:** Jú meira sjálvsálit, jú lættari er at siga frá. Ung, sum trívast, drekka sum heild minni og taka í minni mun rúsevni. Foreldur, sum vilja hava innlit í, hvat tannáringar havast at, mugu lurta við áliti og viðurkennandi heldur enn ákærandi og dømandi. Besta fyribyrgingin er at vera opin og lurta, so tann ungi fortelur, hvar hann ella hon ferðast og saman við hvørjum.

**7. Ver ein góð fyrimynd:** Fleiri kanningar vísa á sambandið millum rúsdrekkanýtsluna hjá ungum og tann háttin, sum foreldrini handfara rúsdrekka. Tí børnini taka við eftir foreldrunum. Sum foreldur hevur tú við tíni atferð eina beinleiðis ávirkan á, hvønn leiklut rúsdrekka skal hava í lívinum hjá barni tínum.

*Kelda: www.alkoholdialog.dk*

# Okkurt løgið hendir eftir jól í 9. flokki

Nógv foreldur eru ov liberal viðvíkjandi rúsdrekka, sigur SSP-ráðgevin, sum biður foreldrini vera meira strong.

- Eg veit ikki, hvat hendir, men kann bara staðfesta, at okkurt broytist miðskeiðis í 9. flokki. Tá kemur rúsdrekka uppí, og tey gerast upptikin av endaveitslum, gallaveitslum og tílíkum, sigur Óli Rubeksen, SSP-ráðgevi.
Í sínum starvi ráðgevur hann næmingum og foreldrum um m.a. rúsdrekka. Missiónin er at fáa tey ungu at bíða sum longst at taka fyrsta smakkin - og annars at drekka sum minst. Hetta eydnast partvís, tí ábendingar eru um, at byrjanaraldurin hækkar eitt vet, sigur Óli Rubeksen og sigur samstundis, at framvegis eru nógv, sum smakka sær á, áðrenn tey eru 18 ár.



## Opin og ov liberal

Hann heldur, at tey ungu drekka meira ódult í dag.
- Fyrr gjørdi tú tær ómak at royna at vera edrú, tá tú komst heim aftaná veitsluna. Men tann virðingin ella óttin er ikki so nógv longur. Nógv foreldur eru rættiliga liberal viðvíkjandi rúsdrekka til tannáringar.
Ov liberal, spyrt tú Óla.
Summi keypa børnunum rúsdrekka í 9.flokki ella góðtaka, at systkini keypa fyri tey. Kanska við eini misskiltari fatan, at um tey sjálvi geva barninum rúsdrekka, so halda tey seg til tað. Men royndirnar sum SSP-ráðgevi siga honum, at tað loysir seg best at siga nei.
- Onki er svart-hvítt, men nógv bendir á, at har foreldur fylgja við og eru afturhaldin við rúsdrekka, er betri javnvág hjá teimum ungu, og tey drekka minni. Eisini seinni í lívinum, staðfestir Óli Rubeksen.

## Bólkatrýst

Ofta er tað bólkatrýst, sum fær tey ungu at smakka sær á. Tey gera tað, tí tey kulu í flokkinum gera tað, og tey vilja ikki vera uttanfyri. Ein fatan er, at tú eigur at drekka, tí øll hini gera tað. Hetta er fleirtalsmisskiljing, tí tað eru eisini nógv ung, sum ikki drekka, sigur Óli Rubeksen.
- Nøkur heilt fá hvíla so mikið væl í sær sjálvum, at tey tora væl at siga nei. Men tey flestu tráa eftir felagsskapinum og at hoyra til.
Fyri at linka bólkatrýstið roynir SSP at vísa á øll tey, sum IKKI drekka. Tá hagtøl vísa, at 40 prosent í einum árgangi smakka sær á, er tað týdningarmikið at fortelja um tey 60 prosentini, sum ikki drekka. At venda argumentatiónini hevur ávirkan á tey ungu, sigur Óli Rubeksen

## 17 er meira enn 15

Hóast hann mælir føroyskum foreldrum til at vera meira strong við rúsdrekka, eru undantøk. Tað er hóast alt munur á at vera 15 ár og 17 ár.
- Hava tey verið á fjalli, og snapsurin gongur runt, tá seyðurin er komin til høldar, er onki forgjørt í, at 17 ára gamli fjallmaðurin fær sær upp í munnin, tá hini fáa sær. Vit skulu heldur ikki vera so fýrkantað, sigur Óli Rubeksen.
Hansara bestu ráð eru, at foreldrini tosa við tannáringarnar um rúsdrekka – og onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri tey. Hetta prátið skal takast "í friðartíð", altso áðrenn sonurin ella dóttirin biðja um sína fyrstu øl. Og tí er 13-14 ár ein hóskandi aldur.

**Í Danmark er byrjanaraldurin til rúsdrekka hækkaður seinastu árini, og tey ungu drekka heldur minni. Í 2014 byrjaðu 48% av teimum ungu at drekka, tá tey vóru 15-16 ára gomul, meðan 41% byrjaðu sum 13-14 ára gomul. Fimm ár frammanundan var talið umvent. Hagtølini vísa eisini, at færri drekka regluliga. Talið á 15 ára gomlum, sum drekka hvørja viku, er minkað niður í ein triðing síðan 2002.**

*Kelda: www.alkoholdialog.dk*